# Føroysk og grønlendsk bø vitja hvønn annan

Ein skúlaflokkur í Hoyvíkar skúla fyrireikar seg í hesum døgum til ein ferð til Grønlands, har tey m.a. fara at uppliva túrar á hundasleðu, hundakapprenning og spæla golf á ísinum. Ferðin verður fyriskipað í samstarvi við ein skúlaflokk í Grønlandi, sum ætlandi eisini kemur at vitja í Føroyum




*– Um gott og væl eitt ár eru hesi spentu børnini í Umanak í kópaskinsklæðum og royna hundasleður*

SKÚLI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í apríl mánaði næsta ár fer 6 d. í Hoyvíkar skúla til Umanak í Grønlandi. Tey skulu vitja ein skúlaflokk í Grønlandi og annars í aðrar mátar uppliva nógv av spennandi mentan og náttúru, sum Grøndland hevur at bjóða.

Jonna Færø, sum er flokslærari hjá 6. d. og ferðaleiðari á ferðini, hevur javnan sjálv verið í Grønlandi, men ongantíð áður saman við einum heilum skúlaflokki:

– Tað hevur á ein hátt altíð verið ein dreymur at fara við einum føroyskum skúlaflokki til Umanak. Grønlendska náttúran er sera stórsligin og mentanin heilt øðrvísi, so børnini fáa eina stóra uppliving. Fyri tey er tað eitt stórsligið upplivilsi at fara til Umanak. – Tað er ein heilt onnur verð!, sigur Jonna Færø, flokslærari hjá 6. d.

Hugskotið til ferðina er komið so líðandi: 6.d. hevur í nøkur ár av og á havt einstøk børn úr Umanak á vitjan her hjá okkum í Føroyum, og tað hevur m.a. stuðlað undir hugskotið um hesa ferðina. Flokkurin hevur eisini javnan seinastu árini havt samskifti við ein flokk í skúlanum í Umanak, og hesi koma eftir ætlan til Føroya at vitja í juni 2006.

– Eg havi í eini tvey ár arbeitt dúgliga við at fyrireika ferðina til Umanak og kenni rættiliga fitt til býin, sigur Jonna Færø.

## Umanak

Oyggin Umanak liggur í norður Grønlandi – í víkini norðan fyri nesið Nuussuaq – og hevur um 1200 íbúgvar. Vinnumøguleikarnir har eru eina mest grundaðir á fiskivinnuna – havið um oynna er tilfeingisríkt; har eru nógvir kópar, náhvalir, hvítfiskur og onnur sløg.

Umanak varð í 16. og 17. øld javnan vitjað av hálendskum hvalaveiðumonnum, ið m.a. sæst aftur á staðanøvnum á oynni. Frá gamlari tíð hevur oyggin eisini havt námídnað, men fyrst í 1990'unum dalaði virksemið innan fiskivinnuna og námsídnaðin, og síðan tá hevur samfelagið at kalla staðið í stað. Men Umanak hevur tó ein avgjørdan menningarmøguleika innan ferðavinnuna, og á oynni ber m.a. til at koyra á hundasleðum, fiska, fara á hvalaveiðuferð og at fáa aðrar náttúruupplivingar. Í Umanak er eisini ein stórur skúli, eitt vælvirkandi sjúkrahús og størsta steinkirkjan í Grønlandi.

Í Umanak fara føroysku børnini at uppliva eina rúgvu. Tey fara sjálvandi fyrst og fremst at vera saman við børnunum á skúlanum, men eisini fara tey at vitja nøkur børn á einum barnaheimi. Á skránni eru eisini túrar á hundasleðu – m.a. skipar skúlin fyri hundakapprenning, og so er ætlanin at koyra ein túr á hundasleðu út á ein leguskúla. Túrurin varir heili 6 tímar. Og um tað mundið ferðalagið er í Grønlandi verður eisini ein stór golfkapping á ísinum, so tað fara føroysku skúlabørnini sjálvsagt eisini at síggja og royna:

– Vit hava ein heilan hóp á skánni í Grønlandi – Umanak hevur so ómetaliga nógv at bjóða afturat hesum tiltøkunum, m.a. ógvusligu náttúruna, øðrvísu mentanina – hóast vit hava felags áhugamál, spæla tey somu spøl, eta sama mat og síggja tað sama í sjónvarpinum, so er teirra verð so sera langt frá okkara – so vit fara ikki at binda frið, men at uppliva so nógv, vit náa, sigur Jonna Færø.

## Kostnaðarmikil ferð

Fyri at koma úr Føroyum til Umanak, má ferðalagið, sum telur 25 fólk – 2 lærarar, 2 foreldur og 21 børn – millumlenda 5 ferðir og flúgva við tyrlu seinasta strekkið. Í alt tekur ferðin um 14 tímar á flogi, so at fara longu ferðina er rættiliga kostnaðarmikið. Ferðaseðilin fyri hvønn kostar um 15.000 kr. Men 6. d. er fyri langari tíð síðani byrjaður at søkja um stuðul og at skipa fyri ymiskum tiltøkum. M.a. hevði flokkurin fyri kortum eina framsýning í SMS við grønlendskum lutum, og henda eydnaðist rættiliga væl. Og nú hava tey eisini gjørt lutaseðlar – Skava og Vinn, ið børnini ganga runt Føroyar og selja. So hóast ferðin kostar nógv, sær Jonna Færø ljóst upp á tað og vónar, tey fara at fáa allar pengarnar til vega:

– Tað er eitt ómetaliga stórt upplivilsi hjá børnunum – tey fara at uppliva ymiskt, tey ongantíð annars koma til – so tað fer avgjørt at verða allar pengarnar, stríðið o.a. vert.Vit hava eisini sera góðar umstøður til at fara hagar, tí eg havi familju og vinir har, ið hjálpa okkum at leggja ferðina til rættis.

## Børnini spent

Jonna Færø heldur, at Grønlandsferðin varð ótrúliga væl móttikin av øllum – bæði børnum, foreldrum og leiðsluni:

– Tey eru øll sera spent til ferðina og hava veitt okkum dyggan stuðul. Áhugin í flokkinum fyri Grønlandi er eisini stórur. – Serliga spent eru tey at hitta grønlendsku børnini á sama aldri og við somu áhugamálum, at uppliva gerandisdagin hjá grønlendingunum í kamikkum og kópaskinsklæðum umframt at síggja veiðumenninar. Tey eru samstarvshugað á øllum økjum, og taka tey øll eina hjálpandi hond í við fyrireikingunum, tá tørvur er til tess.

## Fyrireika seg væl

Lærararnir hava saman við børnunum longu fyrireikað seg væl til túrin: Hava sæð filmir, ið grønlendsku skúlabørnini hava sent til Føroya, lisið ymiskar søgur og havt vitjan av nøkrum børnum úr Umanak, ið eru og ferðast í Føroyum av og á. Flokkurin hevði fyri kortum vitjan av eini grønlendskari kvinnu, ið lærdi børnini at perla á grønlendskum og at skera og seyma ymiskt úr kópaskinni, og tað hildu tey vera stuttligt.

## Dagbók á sjónbandi

Jonna hevur í hyggju at hava